# Søguligur sigur í Klaksvík




*Eftir 15 dystir uttan nakað stig, bragdaði mikukvøldið hjá Team Klaksvík, sum á heimavølli basti H71*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR Team Klaksvík skrivaði mikukvøldið søgu, tá tað eydnaðist at vinna fyrsta dystin í Atlantic Airways-kappingini. H71 var felagið, ið mátti lúta fyri klaksvíkingunum**

Hilmar Jan Hansen

Hagtølini teknaðu eina greiða mynd av støðuni hjá Team Klaskvík, sum spælir sítt fyrsta kappingarár í bestu mansdeildini. Liðið hevði spælt 15 dystir uttan sigur, og málúrtøkan vísti ein mun upp á 194 mál í undirskoti.

Nú H71 vitjaði í Badmintonhøllini í Klaksvík fyri aðru ferð innan fáar dagar, skuldi tað gerast ein dystur, ið skrivaði søgu, tí tá liðugt var, stóð Team Klaksvík eftir sum vinnari. Og tað fegnaðust klaksvíkingar um, hóast tað framvegis er langt upp til hini liðini.

– Vit dekkaðu væl, og fyri fyrstu ferð fingu vit verjuna at koyra ordiliga. Endiliga eydnaðist tað, sigur Fríðin Ziskason, ið bæði er formaður í felagnum og annar venjarin hjá Team Klaksvík.

Team Klaksvík var á odda 17-14 í hálvleikinum, og endaði við at vinna 32-30. Tá bara tveir minuttir vóru eftir, kom H71 upp á javnt, 30-30, men so skoraðu Dánjal Kjærbo og Beinir Heðinsson tey bæði sigursgevandi málini síðstu løtuna.

– Tað hevur gingið rætta vegin hjá okkum síðani á jólum, og hetta var nógv tann besti dysturin, vit hava spælt í vetur, sigur Fríðin Ziskason.

Toppskjútti hjá Team Klaksvík var hoyvíkingurin, Hanus Norðberg, sum skjeyt 12 mál. Fyrr í vetur spældi hann við H71, men er nú fluttur til Klaksvíkar. Besti málskjútti hjá H71 var Dánjal Tórgarð, somuleiðis við 12 málum.




*ÍF hevur framvegis beina kós í FM-finaluna hjá monnum eftir 3-1 sigur á SÍ í gjárkvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ÍF vann toppdystin

**FLOGBÓLTUR Tá sørvingar í gjárkvøldið tóku ímóti ÍF, fingu teir bitið rímiliga væl frá sær, til spælandi venjarin tók munnin ov fullan og fyrst fekk gula og síðani reyða kortið**

Hilmar Jan Hansen

Fuglfirðingar eru framvegis við fullari ferð á veg í FM-finaluna hjá monnunum, og hóast teir í gjárkvøldið fingu mótstøðu frá SÍ í Sørvági, vann ÍF dystin 3-1 og er nú seks stig fremst í Eik-liguni. SÍ er hinvegin bara trý stig framman fyri Mjølnir og fimm framman fyri Fleyr, ið bæði skulu spæla ímóti TB um vikuskiftið. Tá kann hugsast, at tann munurin minkar.

Tey bæði fyrstu settini vóru rímiliga jøvn, men fingu hvør sín vinnara. Tí var umráðandi hjá báðum pørtum at vinna triðja sett, men her kom tað at kosta SÍ, at spælandi venjarin, Rajko Petrovic, fyrst grenjaði um ein bólt, sum SÍ vann til 11-11, so hann fekk gula kortið og ÍF stigið til 11-12. Men hann grenjaði víðari og endaði við at fáa reyða kortið, og so var eingin hjálp eftir í honum.

Endin var, at ÍF royndist drúgvari og vann triðja sett, og í fjórða setti var lítil og eingin ivi, so tað koyrdu fuglfirðingar heim. Tí kundu teir fara heimaftur til Fuglafjarðar í nógva vindinum við tveimum stigum í viðføringum, meðan SÍ sat eftir við ongum – hóast dysturin vísti, at skerda SÍ-liðið ikki enn skal avskrivast.

## Næstu dystirnir

Sum sagt, eru tveir mansdystir um vikuskiftið, tá fyrst Mjølnir í morgin tekur ímóti TB, og síðani TB sunnudagin tekur ímóti Fleyr. TB hevur enn ongan dyst vunnið, so tí verða tað væntandi hini bæði, ið fáa stigini og sostatt taka seg nærri sørvingum.

Hjá kvinnunum eru tríggir dystir sunnudagin, og øll liðini spæla úttan Mjølnir og Dráttur, ið møttust í vikuni og eru ávíkavist fremst og aftast.

Serliga munnu mong eygu fylgja við, hvussu fer at gangast SÍ og Fleyr, ið royna at hanga í Mjølnir, sum í løtuni er trý stig framman fyri hini bæði. SÍ tekur í Sørvági ímóti ÍF og Fleyr hevur heimadyst ímóti KÍF. Triði dysturin er í Trongisvági millum TB og Ternuna.

hilmarjan@sosialurin.fo

**SÍ - ÍF 1-3**
(23-25, 25-21, 20-25, 18-25)

# Fullmannaðar finalur

**HONDBÓLTUR Tjaldurskvinnur vunnu aftur á Neistanum og skulu møta Stjørnuni í steypafinaluni, meðan KÍF-menninir eru klárir at møta Neistanum í mansfinaluni eftir sigur á StÍF**

Hilmar Jan Hansen

Kvinnurnar hjá Tjaldri spældu seg mikukvøldið í steypafinaluna, tá tær á heimavølli vunnu á Neistanum við tveimum málum. Tjaldur, sum var á odda allan dystin, vann fyrru hálvfinaluna við átta málum og er tí víðari samanlagt 62-52.

Í finaluni skal Tjaldur spæla ímóti Stjørnuni. Hesi bæði liðini møttust eisini í steypafinaluni fyri tveimum árum síðani, og ta ferðina vann Stjørnan 25-23. Hetta er annars áttanda árið á rað, at Stjørnan er í steypafinaluni.

Var kanska ikki so stórur spenningur í Runavík, var øðrvísi á Skála, har StÍF og KÍF møttust, tí ta fyrru vunnu kollfirðingar á heimavølli við bara einum máli. Hesa ferð tóku teir sær kortini betri partar fyri og vóru á odda allan dystin.

KÍF skal í steypafinaluni møta Neistanum, sum vann bæði í fjør og í fyrraárið. Kollfirðingar hava bara eina ferð verið í steypafinaluni fyrr. Tað var í 1986, tá teir taptu við bara tveimum málum fyri Kyndli.

## Neistin hevur frí

Bæði hjá kvinnum og monnum eru liðini hjá Neistanum millum oddaliðini, men hvørki teirra spælir um vikuskiftið. Í Sunset-kappingini hjá kvinnum eru tríggir dystir um vikuskiftið, og teir eru allir í morgin. Serliga áhugavert verður at síggja, um Stjørnan kann vísa, at tapið fyri StÍF í steypakappingini var eitt undantak, meðan Tjaldur helst fær sítt at síggja til, tá VB vitjar í Runavík.

Hjá monnunum kunnu kollfirðingar royna at nærkast Neistanum, tá teir sunnudagin møta særdu hoyvíkingunum, og tá skal Team Klaksvík á útivølli ímóti StÍF vita, um sigurin á H71 í vikuni kann endurtakast. Triði dysturin verður í morgin millum Kyndil og VÍF, ið bæði munnu vera tvey skuffað lið, nú finaludreymurin kámast.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Ítrótturin um vikuskiftið:

**Eik-ligan, kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | 06/02 | 15.00 | SÍ - ÍF |
| FLOGBÓLTUR | 06/02 | 15.00 | Fleyr - KÍF |
| FLOGBÓLTUR | 06/02 | 15.15 | TB - Ternan |

**Eik-ligan, menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | 05/02 | 12.00 | Mjølnir - TB |
| FLOGBÓLTUR | 06/02 | 13.30 | TB - Fleyr |

**Sunset-kappingin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | 05/02 | 14.30 | Kyndil - VÍF |
| HONDBÓLTUR | 05/02 | 15.00 | Tjaldur - VB |
| HONDBÓLTUR | 05/02 | 17.00 | StÍF - Stjørnan |

**Atlantic Airways-kappingin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | 05/02 | 16.00 | Kyndil - VÍF |
| HONDBÓLTUR | 06/02 | 16.00 | StÍF - Team Klaksvík |
| HONDBÓLTUR | 06/02 | 16.00 | H71 - KÍF |